## Lyon ætlar sær Bendtner

Fyri góðum hálvum ári síðani vóru nógv, sum ikki kendu til danska fótbóltsleikaran, Nicklas Bendtner. So leikti hann eitt fantastiskt EM fyri U-21 landslið, fekk sín fyrsta dyst fyri danska A-landsliðið, og knappliga var ungi danin ein áhugaverdur leikari fyri fleiri evropeisk stórfeløg. Seinasta felagið í røðini er franska meistaraliðið, Lyon, sum eftir øllum at døma hevur boðið Arsenal 100 mió kr. fyri at tryggja sær Bendtner í summar. Enn er ikki greitt, hvørt Arsenal vil selja Bendner, sum í løtuni er leigaður út til oddaliðið í næstbestu ensku deildini, Birmingham.



## Ovi Nysted til B36

B36 hevur tryggjað sær enn ein styrk til komandi kappingarár. Ove Nysted, sum hevur leikt á besta KÍ-liðnum seinastu árini, hevur skrivað undir eitt ára sáttmála við steypavinnararnar úr B36. Ove er stórur og sterkur leikari, sum vanliga leikar í miðverjuni. Hann kann tó eisini nýtast mitt fyri í álopinum, har hann ofta er vorðin brúktur fyri KÍ. Serliga í deyðbólsstøðum kann Ove gerast ein sannur fongur hjá B36, tí her er hann ein av allarsterkastu leikarum í føroysku kappingini.

## GÍ-venjarar halda fram

Venjararnir hjá besta mansliðið og besta kvinnuliðið hjá GÍ halda fram komandi kappingarár. Hjá Formulaliðnum hevur Petur Mohr longt um sáttmálan sum høvuðsvenjari, og afturat sær hevur hann Berg Hansen og Paula Jarnskor. Petur Thomsen hevur tikið sær av kvinnuliðnum hjá GÍ síðstu 2 árini, har tær hava vunnið eitt bronsumerkið og eitt silvurmerkið. Eisini hann hevur longt um sáttmálan fyri komandi kappingarár, so spennandi verður at síggja, um tær nú fara at røkka enn longur í landskappingini.

## Chelsea snávaði enn einaferð

Við einum sigri í gjárkvøldið kundi Chelsea minka um munin upp til oddalið, Manchester United, sum bert fekk javnleik á útivølli ímóti Newcastle nýggjársdag. Enska meistaraliðið megnaði tó ikki at hála sigurin í land, tá teir vitjaðu hjá Aston Villa. Sjálvt um Chelsea var væl betra liðið, so endaði dysturin við javnleiki 0-0. Arsenal var eisini á vøllinum í gjár, tá teir møttu botnliðnum Charlton. Úrslitið gjørdist ein tryggur 4-0 sigur til Arsenal. Fyrst skoraði Henry við brotssparkið, áðrenn Justin Hoyte økti til 2-0 fyri hálvleik. Í seinna hálvleiki skoraði Arsenal tvær ferðir afturat, og í báðum førum var tað hollendingurin, Robin van Persie, sum hevði síðsta fót á bóltinum.

Hondbóltur:

# Skuffaður landsliðsvenjari

**Landsliðsvenjarin, Birgir Hansen, var skuffaður um avgerðina hjá kyndlaleikarunum at taka seg av landsliðnum. - Hetta málið hevur jú slett einki við landsliðið at gera, og eg haldi, at Kyndil straffar skeiva partin, sigur Birgir**



*- Mín meining er, at tá leikarar taka slíkar avgerðir, so skulu teir eisini kenna fylgjurnar og taka av teimum avleiðingum, sum hetta kann fáa*

*savnsmynd*

**HONDBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri knøppum trimum vikum síðani leiktu Neistin og Kyndil síðsta dystin í grundspælinum. Dysturin endaði við javnleiki, og hesin javnleikur var sum ein sigur fyri bæði havnarliðini, tí hvørki teirra hevði nakran javnleik undan dystinum.

Eftir dystin bleiv tó øgiligt rok á vøllinum, sum endaði við, at kappingarnevndin hjá hondbóltssambandinum gav Hans Áka Dal Christiansen leikbann í tríggjar dystir fyri at hava skumpað Guðruna Horn, sum situr við dómaraborðið hjá Neistanum.

Hesa avgerð hjá kappingarnevndini vildi Kyndil ikki góðtaka, og teir hava kært málið víðari til dómsnevndina, har tað í løtuni er til viðgerðar. Í samband við avgerðina hjá kappingarnevndini valdi Kyndil eisini at taka allar sínar leikarar av landsliðnum í hondbólti, og hetta var landsliðsvenjarin, Birgir Hansen, sera skuffaður av.

### Ov skjót avgerð

– Landsliðið var savnað til venjingar millum jól og nýggjár, og tann eina dagin, tá vit skuldu venja, síggi eg, at har mangla fleiri leikarar. Eftir eini løtu koma allir kyndlaleikararnir inn, og eg biðji teir fara at skifta. Tá fái eg at vita, at teir fyribils hava tikið seg av landsliðnum.

Hetta sigur landsliðsvenjarin í hondbólti, Birgir Hansen, sum slett ikki skilir avgerðina hjá kyndlaleikarunum.

– Eg dugi ikki heilt at skilja avgerðina hjá Kyndli. Teir hava jú kært málið víðari til dómsnevndina, og so er eingin endalig avgerð tikin. Eg haldi teir áttu at bíða at gjørt nakað, til dómsnevndin hevði tikið sína avgerð.

Birgir heldur eisini, at Kyndil hevur drigið landsliðið inn í eitt mál, sum slett einki hevur við landsliðið at gera.

– Eg haldi, at Kyndil straffar skeiva partin, tí hetta hevur jú slett einki við landsliðið at gera.

### Kann fáa avleiðingar

Sjálvt um landsliðsvenjarin er skuffaður av avgerðini hjá kyndilsleikarunum, so tykist hann á ongan hátt at góðtaka hesa avgerð.

– Hetta kann ikki góðtakast, og tað er ikki óhugsandi, at hetta málið kann fáa avleiðingar fyri kyndilsleikararnar víðari á landsliðnum.

Birgir Hansen sigur tó, at hann fyrst má tosa við hondbóltssambandið, so teir felags kunnu finna út av teimum mannagongdum, sum hondbóltssambandið hevur í slíkum førum.

– Nú mugu vit fara at kanna, um hondbóltssambandið hevur nakrar mannagongdir fyri slíkum, men mín meining er, at tá leikarar taka slíkar avgerðir, so skulu teir eisini kenna fylgjurnar og taka av teimum avleiðingum, sum hetta kann fáa.

Enn er ikki greitt, hvørja avgerð dómsnevndin tekur í málinum um Hans Áka Dal Christiansen, men avgerðin hjá kyndilsleikarunum at taka seg av landsliðnum kann eftir øllum at døma fáa avleiðingar fyri teirra luttøku á landsliðnum.